RUNAVÍKAR KOMMUNA

## Soleiðis verður ruddað

Mannagongdin verður soleiðis:

Kommunan velur eitt alment øki.

Lýst verður gjøgnum miðlarnar við eini freist fyri, nær óruddið skal vera burturbeint av tí almenna økinum.

Um tú veist, at tað ikki ber til at burturbeina lutirnar av økinum áðrenn ta ásettu freistina, ert tú vælkomin til at ringja til Runavíkar kommunu og gera eina avtalu um eina nýggja freist.
Hevur tú fingið loyvi frá kommununi til at seta lutir út á alment øki, verður tú biðin um at fáa hetta váttað aftur.  Avtalur skulu frameftir verða skrivligar.

Finnur kommunan fram til, hvør eigarin er, kann kommunan seta seg í samband við viðkomandi og biðja um at fáa flutt  óruddið til eitt hóskandi stað. Hetta kann eisini enda við, at viðkomandi fær sent ætlanarskriv og boð um burturbeining.

Um lutirnir ikki verða burturbeint av eigaranum, og kommunan ikki finnur eigaran, ella at eigarin ikki sigur frá, verða lutirnir burturbeindir uttan ábyrgd vísandi til §1 stk. 1 og 2 og §28 í kunngerðini um umhvørvisreglur.

Kommunan ætlar at nýta myndir sum skjalprógv fyri, hvørjum standi lutirnir eru í, og at teir hava staðið úti á almennum øki. Um neyðugt, fer kommunan eisini at eftirlýsa eigaran gjøgnum miðlarnar við at nýta myndatilfarið.

Trýst á leinkjuna fyri at lesa meira um, hvat lógin sigur um órudd og burturkast Leinkja